LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 2. juni 2025
J.Nr.: LUM-16- 25/09158-18
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um vantandi svar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum uppá eina umbøn um alment innlit

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá einum journalisti hjá Kringvarpi Føroya um málsviðgerðina av einari umbøn um innlit hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Umboðsmaðurin helt tað vera átaluvert, at innlitsumbønin ikki var avgreidd fyrr enn 38 dagar eftir at umbønin varð latin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Harafturat helt umboðsmaðurin tað ikki vera nøktandi, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið sendi umboðsmanninum eina umbidna frágreiðing til klaguna 20 dagar eftir freistina, ið umboðsmaðurin hevði ásett. Umboðsmaðurin gav samanumtikið Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli.*

## 2. Klagan

Við skrivi, dagfest 2. apríl 2025, sendi A, journalistur hjá Kringvarpi Føroya, soljóðandi klagu:

> "...
> Tað undrar meg, at eg ONKI yvirhøvur frætti aftur uppá einføldu umbønina um innlit, sum eg sendi tykkum tann 21. mars og minti tykkum á aftur tann 26. mars.
>
> Talan er um eina innlitsumbøn, sum er í tí heilt einfalda endanum, og tí eigur tað ikki at taka so langa tíð at avgreiða hana.
>
> Harumframt vil eg minna á, at 10 daga freistin í innlitslógini er eitt evstamark, og skal ikki fatast sum, at tað EIGA at ganga 10 dagar áðrenn ein rættiliga einføld umbøn verður avgreidd.

> Til endans vil eg eisini minna á lógarásettu vegleiðingarskylduna. Hóast eg havi mint tykkum á umbønina, so fái eg ikki annað enn eina sjálvvirkandi kvittan frá postskipan tykkara. Tað er, eftir mínum tykki, ikki at halda ásettu vegleiðingarskylduna í lógini.
>
> Hesin teldupostur skal eisini fatast sum ein kæra til Løgtingsins Umboðsmann."

Klagarin hevði, tann 21. mars 2025, sent Arbeiðs- og brunaeftirlitinum soljóðandi umbøn um innlit:

> "...
> Við hesum verður biðið um innlit í fundarinnkallingar og frásagnir frá fundum, sum higartil hava verið viðvíkjandi váðameting fyri Føroyar og tilmæli til borgarar um egna trygd í kreppustøðu.
>
> Í øðrum lagi verður biðið um at fáa at vita, hvussu nógvir fundir hava verið um hetta mál og hvørjir stovnar og persónar hava luttikið.
> ..."

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 2. apríl 2025 varð klagan send Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til ummælis. Arbeiðs- og brunaeftirlitið varð biðið um at lata umboðsmanninum eina frágreiðing um viðgerðina av málinum innan 1 viku.

Tann 11. apríl 2025 sendi umboðsmaðurin eina áminning til Arbeiðs- og brunaeftirlitið og bað um at fáa sent umbidnu frágreiðingina sum skjótast.

Tann 22. apríl 2025 boðaði Arbeiðs- og brunaeftirlitið frá, at frágreiðingin fór at verða send umboðsmanninum í seinasta lagi tann 23. apríl 2025.

Tann 28. apríl 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "...
> Til at byrja við skal undirritaði biðja Løgtingsins Umboðsmann halda Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til góðar fyri seina svarið uppá viðkomandi fyrispurning. Seina svarið skyldast ikki illvilja at svara umboðsmanninum, men eina óvanliga stóra arbeiðsbyrðu hjá stovninum seinastu rúmu tíðina, sjúku hjá ymiskum lyklastarvsfólkum og áhaldandi sjúku hjá ..., ið hevur evstu ábyrgd fyri áheitanir sum hesar blíva avgreiddar.
> Fyri at sleppast undan m.a. sovorðnum støðum frameftir, er Arbeiðs- og brunaeftirlitið í holt við eina tilgongd, har eitt starv sum leiðslusamskipari verður skipað – eftir sama modellið sum líknandi starvið hjá KVF. Eitt av endamálunum við hesum starvinum er millum annað at tryggja, at innlitsumbønir frá t.d. miðlum og borgarum og fyrispurningar

frá umboðsmanninum ikki liggja ósvaraðar orsaka av støðunum, sum tær ið eru nevndar omanfyri.
Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur altíð lagt seg eftir, at stovnurin er so atkomuligur hjá miðlunum sum gjørligt og at raðfesta at svara t.d. innlitsumbønum frá miðlunum. Í hesum førinum hava vit ikki livað upp til hetta. Umbønin frá KVF er tó torfør at svara beinleiðis, eftirsum ítøkiliga arbeiðið hjá stovninum ikki er skipað soleiðis, sum umbønin leggur upp til.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur tískil svara viðkomandi soleiðis:

"...
*Viðvíkjandi ítøkiligu innlitsumbønini hjá tær frá 21. mars 2025, er Arbeiðs- og brunaeftirlitið eitt sindur í iva um, hvussu hendan skal svarast, eftirsum arbeiðið at gera váðamyndina fyri Føroyar ikki er lagt til rættis soleiðis, sum innlitsumbønin tykist at leggja til grund.*

*Arbeiðið at gera váðamyndina fyri Føroyar er skipað sum eitt innanhýsis greiningararbeiði hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, har stovnurin er í holt við at meta um váðar fyri hendingum, sum kunnu raka føroyska samfelagið, og hvørjar avleiðingar hesir kunnu ætlast at kunna fáa. ...*
*Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur enn ikki kallað inn til ella havt fundir, ið beinleiðis hava havt til endamáls at umrøða arbeiðið at gera eina váðamynd fyri Føroyar ella tilmæli til borgarar um egintilbúgving.*
..."

Tann 28. apríl 2025 spurdi umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitið, nær svarið varð sent Kringvarpi Føroya. Arbeiðs- og brunaeftirlitið svaraði, at Kringvarp Føroya hevði fingið svar tann 28. apríl 2025.

Tann 30. apríl 2025 varð frágreiðingin frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum send klagaranum til møguligar viðmerkingar.

Tann 30. apríl 2025 svarar klagarin, at hann ikki hevði viðmerkingar til frágreiðingina.

Tann 15. mai 2025 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at umboðsmaðurin var farin í gongd við endaligu viðgerðina av hesum máli.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um málsviðgerðina av innlitsumbønini og málsviðgerðina í sambandi við klagumálsviðgerðina hjá mær.

**Málsviðgerðin av innlitsumbønini**
Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur ein almennur myndugleiki at skipa sínar arbeiðsgongdir soleiðis, at málsviðgerðin av einum máli ikki gerst óneyðuga drúgv.

Um eitt mál ikki kann avgreiðast innan hóskandi tíð, ella málsviðgerðartíðin gerst drúgvari enn vanligt er, eigur myndugleikin at kunna borgaran um orsøkina til seinkanina, og nær tað kann væntast, at málið verður avgreitt.

Umbøn klagarans um innlit er innihaldsliga í tveimum liðum. Tað er mín meting, at fyrri liðurin er ein umbøn um innlit sambært innlitslógini, meðan seinni liðurin er ein vanligur fyrispurningur, ið ikki er fevndur av innlitslógini, men sum, sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur at verða svaraður innan hóskandi tíð.

Í § 16, stk. 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) er ásett, at er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Sambært § 16, stk. 2 hevur myndugleikin sostatt eina fráboðanarskyldu. Ásetingin hevur eisini sum fyritreyt, at myndugleikin beinanvegin snarkannar eina umbøn um innlit, soleiðis at myndugleikin skjótast gjørligt er førur fyri at gera sær eina meting av, hvussu málsviðgerðin skal handfarast, um talan er um viðurskifti, ið fevnd eru av innlitslógini, og hvussu drúgv málsviðgerartíðin kann væntast at verða.

Fráboðanarskyldan, sambært § 16, stk. 2, er treytaleys. Tískil skal ein myndugleiki leggja síni viðurskifti soleiðis til rættis, at hann er førur fyri at geva eina rættstundis fráboðan um tey viðurskifti, ið gera, at málsviðgerðin av einari innlitsumbøn verður seinkað.

Í hesum føri varð umbønin um innlit ikki avgreidd fyrr enn 38 dagar vóru farnir, síðani umbønin varð latin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði í hesum tíðarskeiði ikki givið nakra kunning til klagaran um orsøkina til seinkanina, og nær ein avgerð kundi væntast. Hetta haldi eg vera átaluvert.

Vísandi til omanfyrinevndu frágreiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, haldi eg, at tær orsøkir, ið stovnurin vísir á sum atvold til longu málsviðgerðartíðina, ikki kunnu metast sum umberandi orsøk fyri, at ongin kunning varð givin til klagaran um støðuna og útlitini fyri, nær innlitsumbønin fór at verða avgreidd.

Somuleiðis haldi eg, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið átti at havt viðgjørt og avgreitt fyrispurningin frá klagaranum skjótari. Arbeiðs- og brunaeftirlitið sigur í frágreiðingini til klagaran at: "*Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur enn ikki kallað inn til ella havt fundir, ið beinleiðis hava havt til endamáls at umrøða arbeiðið at gera eina váðamynd fyri Føroyar ella tilmæli til borgarar*

*um egintilbúgving"*. Eg meti, at stovnurin uttan stórvegis hóvasták kundi svara klagaranum, at ongin fundur enn hevði verið í sambandi við tað, ið klagarin spurdi um. At klagarin skal bíða í 38 dagar at fáa svar uppá fyrispurningin, haldi eg verða atfinningarsamt og ikki innanfyri hóskandi tíð.

Ein myndugleiki hevur skyldu at skipa síni viðurskifti soleiðis, at eitt nú stór arbeiðsbyrða ella sjúka í starvsfólkahópinum nerva vanligu málsviðgerðina hjá myndugleikanum sum minst. Hetta kann eitt nú gerast við at hava greiðar mannagongdir kring málsviðgerð, kunning og skjalføring í sambandi við málsframhald av málum, ið eru til viðgerðar, soleiðis at mál ikki liggja ella detta niðurfyri, um so er, at arbeiðsbyrða ella sjúka gera seg galdandi.

Eg taki tó til eftirtektar, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur upplýst fyri mær, at stovnurin fer at bøta um sínar innanhýsis arbeiðsgongdir, soleiðis at støður sum hesar framyvir ikki skulu koma fyri.

**Klagumálsviðgerðin hjá umboðsmanninum**
Undir klagumálsviðgerðini í sambandi við, at klagan varð send Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til ummælis, fekk eg, eftir at hava mint á málið, ikki svar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum fyrr enn 20 dagar aftaná freistina, ið eg hevði sett sum evsta mark at geva mær svar. Hetta haldi eg ikki verða nøktandi, serliga havandi í huga, at talan er um eitt innlitsmál hjá einum fjølmiðli.

**Samanumtøka**
Eg fari samanumtikið at geva Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli og fyri málsviðgerðina í sambandi við klagumálsviðgerðina hjá mær.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður